# Günter Grass

## Valdið og listin IV.



*Günter Grass lesur í Grass-húsinum úr sínum endurminningum. Myndin er tikin í september 2006*

Greinarøð



**Hanus Kamban**

Niederegger, út ímóti Breite Strasse, at kalla yvir av ráðhúsinum í Lübeck og eitt hanagleiv frá Marienkirche, er eitt kaku-kulinariskt slott, eitt tempul vígt teimum søtmungandi og rómabrellutu. Henda bakstursins ævintýrhøll er í tveimum hæddum, í teimum stóru salunum á báðum hæddum eru reytt og gult (ella gylt) teir ráðandi litirnir, gólvteppini eru reyð við gulum rípum, tað hettuformaða loftið yvir tí serligu marsipansalongini er reytt við gulum stavum á, og umframt tað fær ein serlig speglávirkan alt inni at skyggja og glitra, súlurnar eru fýrkantað spegl, á veggjunum hanga spegl, og teir sekskantaðu loftsflatarnir, haðani ljósakrúnurnar hanga, eru somuleiðis innrammaðar av speglrondum.

Reytt og gylt eru tignarlitir, og yvir salunum og salongini er ein keisaraligur dámur, sum fær eina undirstriking aftrat av Strauss-tónleikinum, sum er at hoyra her, og av at innbúgvið sum heild er í Empire-stíli. Men tignin hevur ein sakralan veftur, í salinum í erva eru serligir, avskildraðir básar, har fólk kunnu fara inn og sita á hækkaðum gólvum, sum sótu tey í kórinum í eini kirkju, og eisini her eru gólvteppini reyð, og stólar og beinkir reyðpolstrað.

Tey altarbreyð, sum her eru at fáa, eru tó hvørki turr, tunn ella vatndeyv, tí her fært tú kakur, í øllum hugsandi støddum, við øllum hugsandi litum og í alskyns sniðum, fýrkantaðar, rundar, keylur, sýlindarar, kúlur, torn, kirkjur, kransakakur, jogurtkakur, nøtakakur, marsipankakur, rómakakur, jørðberkakur. Og úti í tí stóru forhøllini er, umframt kondittarí, eisini handil, har tú kanst keypa konfekt, sjokulátu ella marsipan, formað sum revar, hanar, hundar, kettur, íkornar, ravnar, slangur, froskar og annars øll dýr, sum á sinni komu úr Nóa ørk, og helst nøkur aftrat.

### Günter Grass-húsið

Henda yvirflóðin av lystimeti, bakstri og róma skal ivaleyst skiljast sum eitt slag av framkomnari próvtøku. Og hevur tú skilt, at alt hetta meira er ætlað eygunum enn tunguni, og at tú – við tí gitna lücbeckaranum Thomas Mann *in mente* – má læra at hyggja niður í avgrundina uttan at detta ella kava niður í hana, hevur tú staðið hesa marglætisins eldroynd. Og tá er lagamanni at ganga tann stutta teinin yvir í Glockengiesserstrasse, har, stutt frá Katharinenkirche, Günter Grass-húsið stendur.

Ikki tí, her er eisini yvirflóð, men av strangari og meira sublimum slag. Tann, sum fyrstu ferð kemur inn í Grass-húsið, og kanska ikki hevur meira enn eitt sløð av undanvitan um henda listamann, ger tað við einum følilsi, samansettum av gleði, takksemi og ovfarni. Tú kemur fyrst inn í eitt lítið, ljóst móttøkurúm, sum samstundis er bókhandil, við verkum eftir og um Günter Grass. Tú gongur síðani gjøgnum ein urtagarð og kemur gjøgnum høvuðsdyrnar inn í sjálvt Grass-húsið, sum er í tveimum hæddum, við framsýningarhølum í neðra og einum sali í erva, sum verður brúktur til framsýningar, fyrilestrar, móttøkur osfr.

Og her sæst, at Günter Grass er ikki bara rithøvundur, men marglistamaður, prosahøvundur, yrkjari, teknari, málari, myndhøggari og harumframt ein *homo politicus,* sum serliga seinast í seksti- og fyrst í sjeytiárunum var virkin á javnaðarvonginum. Av hansara endurminningum sæst, at áhugin fyri myndlist vaknaði tíðliga, longu sum 10-12 ára gamal í Danzig samlaði Grass upp á kort við smáum endurprentum eftir m.a. Mantegna, Botticelli, Caravaggio, Rafael osfr.

Eftir kríggið fór Grass í læru sum grót- og myndhøggari. Í Grass-húsinum er listin hjá hesum manni til skjals, í móttøkurúminum fáast hansara høggmyndir til keyps, sum smá tvítøk úr bronsu, í urtagarðinum standa tær í fullari stødd, og í framsýningarhølunum hanga málningar og tekningar. Høggmyndirnar eru helst tað fyrsta, ein varnast, tangodansandi pør, sum hava ymiskan atburð, formað við yndi, elegansu og innankæti.

### Rottan og snigilin

Sum listamaður tykist Grass at vera búnaður í einum andsvari

Sosialurin